"Tjekklisti"

**Leygardag:**

Tá tit koma, skal alt verða sett upp. T.v.s. pallur, hátalarar, klaver, bassforsterkari, monitorrack og borð við miksipulti og lokið lyft av. Um tað javan kemur fyri at hetta ikki er uppá pláss, má Karl fáa boð um tað, so vit kunnu fáa tað í rættlag.

Kekklistin hjá uppsetarunum er her (teir sum seta stólar o.a. upp)
http://www.livdin.fo/innanhysis__.php
Har síggja tit hvat skal síggja út tá tit koma.

Uppgávan hjá tykkum er henda:

1. Liðleiðarin kontaktar hjálpara, avtalar tíð og samskipar so at tað passar við tá uppsetingarliðið (teir sum seta stólar o.a. upp) er liðugt, ella skaffar lykil so at tit sleppa inn seinnri. Alt skal verða klárt til kl 18. Skúlin er opin frá Kl. 10:00 til 12:00 hvønn leygarmorgun. Um tit koma uttan fyri ta tíðina, kunnu tit fáa lykil frá Karl. Hann býr beint við skúlan. Viljormsgøta 5.

2. Tjekka plasering av lutum.
   - Hátalararnir skulu standa framman fyri "linjuna", tvørtur um salin, hvar sangararnir koma at standa.
   - Instrumentini skulu standa soleiðis frá høgru: Trummur, bassforsterkari, klaver, gittarforsterkari (tá hann er) og so stativ við mikrofonum.

3. Leggja stagekápulin fram við vinstru gongd, og so inn á miðjuna aftan fyri pallin. Stageboxin skal liggja beint aftan fyri har sangararnir standa.

4. Alt hetta krevur eitt sindur av streymi, so at streymur má takast frá tveimum ymsum gruppum. Alt sum kann forbindast við jørð, skal forbindast við jørð. Hetta er bæði fyri støj og fyri trygdina hjá luttakarum.

5. Forbinda alt eftir vegleiðing sum liggur við miksaran. Tað er: Klaver, bassforsterkari, mikrofoir til sangarar, mikrofonir til trummur og gittarforsterkari tá hann er. Klaverið, bassgittar og kassagittar skal í gjøgnum DI boksina. Best er um ongir káplar ligga framman fyri pallin og so fáir sum møguligt á pallinum. Talumikrofonin skal hava langan kápul, um talarin hevur huga at fara "keitúr" ;)

6. Forbinda monitorar.
   Rakkið við forsterkaranum skal standa beint við stageboxina, aftast á pallinum. Teir stóru monitorarnir eru til sangararnar og verða settir á ein stól framman fyri har sangararnir standa. Teir lítlu eru til tónleikararnar. Ein á klaverið, ein á bassforsterkaran og ein aftanfyri trummusláðaran.

7. Tjekka av at "hol er í gjøgnum"  T.v.s. ljóð í hátalarum og monitorum. Um ivi er í hesum, ring so til "miksaran" og avtala at hann ger hetta tá hann kemur.

   Fyri at tey sum hava ein boðskap ella famførðslu kunnu føla seg so tryggan sum møguligt, er umráðandi at tað er so ruddiligt sum møguligt á pallinum, so at tað ikki skapar óneyðugan forvirring. Fleiri av hesum standa sjálvdan á palli, og eru ikki ordiliga trygg við støðuna :)

**Sunnudag:**

Taka niður aftur sunnudag aftan á møtið, ella aftan á at lovsangurin er liðugur. Umráðandi er at hetta verður gjørt soleiðis at tað er skjótt, lætt og gott at koma til hjá teimum sum skulu forbinda næsta vikuskifti. Tit kunnu gott avtala við tónleikarar og sangara at tey hjálpa til, so vaskiliðið sleppur fram at so skjótt sum møguligt.

Um ikki liggur fyri at verða við eitt vikuskift tú eigur at verða við, ring so til eitt av eykað fólkunum á listanum. Um ongin av teimum kann, ring so til ein annan á listanum og spyr um tit kunnu býta um, og gev so "makkaranum" boð um at tú hevur býtt um.  Liðleiðari  býtir um við liðleiðara og hjálpari býtir um við hjálpara, um tað ber til. Um ikki ber til at býta um við nakran, ring so til Karl.

Á innanhýsis á heimasíðuni eru allar kontaktupplýsingar at finna.
http://www.livdin.fo/innanhysis__.php